Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: MVG og brennievni

Spurningar:

1. Hvussu hevur gongdin verið við mvg-inntøkum av brennievni í februar og higartil í mars í ár?
2. Hvørjar ætlanir hevur samgongan á avgjaldsøkinum um at hjálpa húsarhaldum við at leggja um til aðrar orkukeldur enn olju til sethús?

Viðmerkingar:
Prísurin á brennievni í Føroyum er methøgur. Ein orsøk er, at prísurin á brennievni úti í heimi er vaksin sera nógv. Hetta økir nógv um útreiðslurnar hjá føroyskum húsarhaldum.
Nøkur hava longu lagt um til aðra orku at hita húsini við, men løtan er helst tann rætta at fáa fleiri at leggja um, nú prísurin á brennievni er hækkaður so nógv.
Fyri at fáa greiðu á málinum verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 11. mars 2022

Beinta Løwe Jacobsen